## Ikki byggiloyvi enn

**Slættanes:** Á bygdaráðsfundi í Sandavági mánakvøldið var eitt av málunum tað, sum umrøtt var í blaðnum sama dag: Umsóknin frá einum manni í Vestmanna um loyvi at byggja upp aftur eini hús á Slættanesi. Á bygdaráðsfundinum var samtykt at koyra málið aftur í teknisku nevnd, og at taka støðu til tað á komandi fundi. Ætlanin hjá manninum var at byggja ein hús í gomlum sniði á einum øki, sum hevur verið í familjuni.



## Fara upp á gólv leygardagin

**Skúvoy:** Nú farið verður inn í føstuna, hava skúvoyingar átikið sær at skipa eitt kvøld við føroyskum dansi í bygdini. Hetta tiltakið verður leygarkvøldið, har øll eru vælkomin. Heimasíðan bkv.fo skrivar, at øll eru vælkomin og hevur onkur hug at gista, so verður eisini ein loysn funnin á tí. Sildberin fer annars av Sandi kl. 16:30 henda dagin.

# Einki greitt enn

**Ikki øll samráðingarfólk eru eins bjartskygd og formaður Miðfloksins var í Rás2 seinnapartin í gjár. – Tað kann fara báðar vegir, segði eitt umboð Tjóðveldis áðrenn samráðingarnar byrjaðu aftur í morgun**

POLITIKKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Klokkan gott og væl níggju í morgun sessaðust fólk aftur við samráðingarborðið við einari CEH samgongu fyri eyga*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var lítið at frætta frá samráðingunum millum teir tríggjar flokkarnar, tá samráðingarfólk møttu í morgun.

Samráðingarleiðarin, Jóannes Eidesgaard, hevði ikki nøgv at siga, og spurdur um nær hann væntaði samráðingarnar komnar undir land, hevði hann einki boð.

Einki er liðugt, áðrenn alt er liðugt, tykist vera slagorðið hjá samráðingarluttakarunum.

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, var annars so bjartskygdur, tá Rás2 tosaði við hann seinnapartin í gjár, at hann væntaði, at eitt samgonguskjal var klárt at skriva undir í dag. Men tað eru hinir flokkarnir eftir øllum at døma ikki samdir við Jenisi í.

Nývaldi tingmaðurin fyri Tjóðveldi, Sjúrður Skaale, kundi upplýsa, at hann av góðum grundum ikki hevði so nógv at siga, men at tað »kundi fara báðar vegir«, sum hann málbar seg.

Líka lítið hevði formaður Tjóðveldis, Høgni Hoydal, at siga í morgun. Heldur ikki hann hevði nakað boð upp á, nær og um eitt samgonguskjal var klárt at skriva undir.

Hann váttaði annars, at samráðingarnar gingu hampiliga væl í teimum átta málsbólkunum, men segði eisini, at enn var ikki komið á mál. Formaður Tjóðveldis vildi heldur ikki siga, um teir átta bólkarnir umboða tey átta málsøkini, sum flokkarnir skulu deilast um, verður ein samgonga veruleiki.

### Eingin tunnil

Ein av teimum fyrstu, sum møttu til samráðingar í morgun, var Gerhard Lognberg. Men sambært honum, var einki orð enn skrivað um ein Sandoyartunnil í einum komandi samgonguskjali.

Hann var kortini ikki so øðrkymlaður av hesum, tí – sum hann vísti á – stóð heldur einki um ein Norðoyatunnil í samgonguskjalinum í sínari tíð, men hann kom kortini sum ætlað.

Hinvegin vísti hann eisini á í morgun, at tað var tunnilin, hann var valdur upp á, og at hesin alla tíðina hevði verið hansara hjartaðmál.

Men heldur ikki Gerhard Lognberg dugdi ella vilodi geva eitt boð upp á, nær samráðingarnar verða liðnar, ella um tær bera á mál.

Somu boð hevði eisini Karsten Hansen, tó at hann helt, at samráðingarnar ganga væl.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen, sum er spildurnýggj í politikki, metti, at samráðingarnar eisini ganga væl.

- Nú havi eg sjálvandi einki at sammeta við, men eg haldi tað hevur gingið rættiliga væl, segði hon, tá vit frittaðu í morgun.

### Ikki í pottinum

Men tann týðiliga fatanin, sum stendur eftir, tá vit tosaðu við politikararnar í morgun um samráðingarnar er, at enn er ikki komið so nært einum positivum úrsliti, sum Jenis av Rana vildi vera við seinnapartin í gjár.

Tað, sum tó stendur fast, er, at ein ella onnur loysn helst skal finnast innan komandi leygardag, tá tingið skal koma saman at velja eitt nú formansskap.

Og slitna hesar samráðingarnar, verða ikki tær góðu stundirnar hjá øðrum flokkum at finna eina semju.

Men fyribils halda samráðingarnar millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin so fram, og bæði Portalurin og Rás2 fara at fylgja við gongdini gjøgnum dagin.



*Gerhard Lognberg var ein av teimum fyrstu at møta til samráðingarnar í morgun, men hann hevur enn ikki fingið Sandoyartunnilin við í eitt møguligt samgonguskjal*

*Mynd: Jens Kristian Vang*